# Dúgvan fyri seinastu ferð

**Leygardagin klokkan 13 fór Dúgvan sín seinasta túr úr Leirvík. Pauli Magnusson førdi skipið tann síðsta túrin**

SEINASTI TÚRUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Nógvir norðoyingar fegnaðust um, at tunnilin lat upp leygardagin, men tað var eisini ein syrgilig løta hjá nógvum. Mest sum allan fyrrapartin stóðu fólk við ferjuleguna og fagnaðu Dúgvuni. Tað var eitt sorgblítt farvæl til ein trúgvan tænara.

Tá ið Dúgvan silgdi inn í Klaksvíkina, heilsaðu lastbilar dúgvuni. Floyturnar á stóru bilunum rungaðu um allan býin. Dúgvan heilsaði aftur við floytuni, meðan hon silgdi runt nakrar ferðir, áðrenn hon legði at.

Skipari á seinasta túrinum hjá Dúgvuni var Pauli Magnusson.

– Tað er við einum ávísum sorgblídni, at eg sigli tann síðsta túrin, tí at Dúgvan er eitt deiligt arbeiðspláss, sigur Pauli. Hann sigur seg hava havt nøkur góð ár, tey fimm árini hann hevur silgt við.

– Onkuntíð hevur onkur fýst eitt sindur, tá ið vit hava verið seinkaðir, ella vit hava avlýst onkran túr vegna veður, men sum heild eru ferðafólkini sera fryntlig, sigur fyrikomandi skiparin.

–Hóast undirsjóvartunlarnir eru orsøk til, at skip verða løgd, og harvið arbeiðspláss niðurløgd, so haldi eg, at tað er deiligt við undirsjóvartunlunum. Tað ger samferðsluna so nógv lættari, sigur Pauli Magnusson.

Til spurningin um, hvat nú skal henda við manningini umborð á Dúgvuni, sigur Pauli Magnusson, at tey flestu verða flutt á aðrar farleiðir. Onkrar uppsøgnir verða, og onkur fer frá vegna aldur. Sjálvur skal Pauli sigla um Skopunarfjørðin.

Vit á Sosialinum ynskja Paula og fyrrverandi manningini alt tað besta framyvir.



*Skipari á síðsta túrinum hjá Dúgvuni var Pauli Magnusson. Við hansara lið situr sonurin Ólavur, sum hjálpir til.*



# Skiparin lítli

**Saman við so mongum øðrum, var sjey ára gamli Ólavur Paulasson Johannesen umborð á Dúgvuni, tá hon fór seinasta tærin um Leirvíksfjørð**

SÍÐSTI TÚRUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Men Ólavur át ikki pylsur eins og hini børnini, ella spældi úti á dekkinum. Nei, hann var við pápa sínum til arbeiðis henda søguliga dagin, tá Dúgvan sigldi sín seinasta túr.

Meðan pápin, Pauli Magnusson, var uppi á brúnni, var tað Ólavur, sum saman við øðrum, skipaði bilarnar inn í ferjuna. Seinni, tá ið fólk og bilar vóru innanborða, hjálpti hann pápi sínum uppi á brúnni.

Ólavur gongur í fyrsta flokki, og júst sum øll hini børnini gleddi hann seg til at hátíðarhalda tunnilin. Uttan at vita við vissu, hvussu hetta skuldi gerast, segði hann, at hann fór mest møguligt at halda seg uttandura í góðveðrinum, sum var leygardagin.



## Seinasti túrurin hjá Ternuni

Hugnaligur og sorgblíður. Soleiðis kendist tað, at vera millum seinastu ferðafólkini við Ternuni um Leirvíksfjørð. Men mest av øllum var tað veitsludámur, tá Ternan kom at landið, og allir lastbilarnir á landi floytaðu, meðan Ternan heilsaði við horninum. Umborð fingu ferðafólkini ókeypis kaffi, karamellir og sunkist, og ein serligur ferðaseðil varð prentaður í sambandi við seinasta túrin.

Karmal Olsen førdi skipið seinasta túrin, og hann segði tað vera eina hátíðarløtu, sum kortini var sorgblíð.






*Strandferðslustjórin, Kristian Davidsen, heilsar Jákupi Joensen, sum sigldi um Leirvíksfjørð í mong ár. Hann seldi eitt nú ferðaseðlar og var kendur fyri sínar stuttligu viðmerkingar til ferðafólkini.*